Dátueftirlitið

MEGD
Íslandsvegur 10 c
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 19. mars 2021
J.nr: 21/00147-4
Málsviðgeri: HS

**Viðvíkjandi áheitan frá MEGD**

Dátueftirlitið takkar fyri brævið frá MEGD um viðgerð av persónupplýsingum í miðlunum.

Dátueftirlitið tekur yvirskipað undir við MEGD, at tað er umráðandi, at upplýsingar um einstaklingar, sum fáa viðgerð í heilsuverkinum, skulu verjast, og at tann einstaki ikki verður umtalaður og útstillaður alment.

Dátuverndarlógin skal tryggja verju av einstaklingum, tá persónupplýsingar verða viðgjørdar. Dátuverndarlógin setur m.a. sum krav, at viðgerð av persónupplýsingum skal verða heimilað, saklig og avmarkað til tað, sum er neyðugt.

MEGD vísir í brævinum á, at almenningurin hevur fingið innlit í hagtøl av smittaðum, sum eru so nógv útgreinað, at til ber at rokna seg fram til, hvørjar persónar talan er um. MEGD vísir í brævinum eisini á umrøðuna, sum hevur verið í fjølmiðlunum um persónar, sum eru koppsettir.

Dátueftirlitið kann vísa á, at hagtøl, sum verða útgivin alment, eiga at verða sett soleiðis saman, at tað ikki er gjørligt at eyðmerkja tann einstaka. Útgangsstøðið er, at um hagtølini eru býtt út á landaøkir, og kyn og aldur ikki verður upplýst, er talan um anonymar upplýsingar, tí tað ikki út frá hagtølunum ber til at finna fram til viðkomandi persónar. Tískil ber til – uttan at hetta er í ósamsvari við dátuverndarlógina – at upplýsa, at tað t.d. eru 3 smittað við koronu á Sandoynni í einum ávísum tíðarskeiði. Tað sama er galdandi fyri ferðandi um flogvøllin.

Dátueftirlitið kann harumframt vísa á, at viðgerð av persónupplýsingum, sum fer fram í fjølmiðlunum, og sum hevur eitt journalistiskt endamál, í høvuðsheitum er undantikin lógarinnar virkisøki. Víst verður til § 3, stk. 3, í dátuverndarlógini. Ásetingin skal m.a. viga dátuverndarrættin mótvegis talu- og skrivifrælsinum.

Víst skal verða á, at fjølmiðlar eru fevndir av løgtingslóg nr. 45 frá 16. mai 2006 um fjølmiðlaábyrgd, sum broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2007. Løgtingslógin ásetur m.a., at fjølmiðlar skulu halda góðan fjølmiðlasið.

Av tí, at nevndu viðurskifti ikki eru í ósamsvari við dátuverndarlógina, ger Dátueftirlitið ikki meira í sambandi við áheitanina frá MEGD. Dátueftirlitið fylgir tó støðugt við í, hvussu persónupp-

Dátueftirlitið

lýsingar verða viðgjørdar. Um Dátueftirlitið gerst varugt við, at viðgerð av persónupplýsingum fer fram í stríð við dátuverndarlógina, tekur Dátueftirlitið málið upp til viðgerðar.

Vinarliga

Katrin Thorsvig Hansen
*Stjóri*